## Áskoðarapláss rapaðu í Göteborg



Tað skuldi verða ein gleðisdagur, tá Göteborg-felagið, Örgryte aftur vann sær sætið í bestu svensku fótbóltsdeildini, tá teir í dysti í næstbestu svensku fótbóltsdeildini tóku ímóti Väsby. Men tá gamli FCK-spælarin, Markus Allbäck skoraði til 1-0 til Örgryte gekk galið. Ein rúgva av Örgryte-viðhaldsfólkum vóru stúgvaði saman, og tá tey í gleðisrúsi fegnaðust um 1-0 málið hjá Allbäck kláraði áskoðaraskýlið ikki alt trýstið, og tann eina girðingin hoyknaði, og 40 áskoðarar fóru sendandi oman á økið frammanfyri áskoðaraskýlið. Sjúkrabilar komu beinavegin á staðið, men tíbetur var bara neyðugt at flyta tann eina áskoðaran á sjúkrahús. Fleiri av hinum fingu minni skaðar og skursl, men tað var ikki mett at verða neyðugt, at hesi høvdu tørv at fara á sjúkrahús. Fleiri av áskoðarunum blivu fluttir frá áskoðaraskýlinum og til onnur øki kring vøllin. Ein tíma aftaná óhappið var mett, at trygdin var í lagi, og dysturin var blástur í gongd aftur.

## Kend sitat

Talan var ikki um best eydnaðu donsku luttøkuna í endaspæli, tá EM varð spælt í Onglandi í 1996. Meira enn úrslitini, har Danmark noyddist at veittra farvæl eftir bólkaspælið, stóðu tvey sitat tó eftir í huganum. Táverandi venjarin, Richard Møller Nielsen og áleyparin, Mikkel Beck, fingu nevnliga sítt pláss í søguni, tá teir tosaðu um: »We have to screw down the expectations« og »I think we have to play with long balls«.

# 100 ár síðani Danmark sp

**Í gjár vóru liðin 100 ár síðani danska fótbóltslandsliðið spældi sín fyrsta altjóða skrásetta landsdyst. Misjavnt hevur gingið hesi 100 árini, men Danmark hevur sanniliga eisini góð úrslit at vísa á. Serliga fyrst og síðst í 20. øld**



*Kanska besti dysturin í danskari fótbóltssøgu varð spældur grundlógardag í 1985. Preben Elkjær og Michael Laudrup skoraðu tvey mál hvør, tá Danmark vann 4-2 móti Russlandi*

*Mynd: Polfoto*

FÓTBÓLTUR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Danska fótbóltssambandið, Dansk Boldspil Union - DBU - er millum tey elstu fótbóltssambondini í heiminum. DBU varð stovnað í 1889, og var DBU millum tey fótbóltssambondini, sum stovnaðu altjóða fótbóltssamgonguna, FIFA tann 21. mai í 1904.

Kortini spældi Danmark ikki sín fyrsta altjóða skrásetta landsdyst, fyrr enn tann 19. oktober í 1908. Talan var um ein dyst í olympisku fótbóltskappingini í London, og sigast má, at danir høvdu eitt sterkt lið tá. Fyrsta altjóða skrásetta dystin, sum var ein olympis fjórðingsfinala ímóti Fraklandi »B« vunnu danir 9-0, aftaná hálvleiksstøðuna 4-0. Niels Middelboe fekk æruna at skjóta fyrsta skrásetta landsliðsmálið hjá Danmark. Danmark møtti Fraklandi »A« í hálvfinaluni, og her gjørdist talan um ein knúsandi 17-1 sigur til Danmark, sum enn tann dag í dag er danskt met. Sophus »Krølben« Nielsen skeyt heili 10 mál í hesum dystinum, sum somuleiðis er met.

Tað nærmasta eitt danskt landslið í nýggjari tíð hevur verið at slá metið, varð tann 23. august í 1967, tá Danmark á gomlu Ítróttarparkini í einum venjingardysti vann heili 14-2 í Ìslandi. Danmark vann silvur á olympisku leikunum í 1908. Í finaluni taptu teir 2-0 ímóti Stóra Bretlandi. Danmark hevði eitt gott landslið um hesa tíðina, og tá olympisku leikirnir vóru í Stokkhólmi í 1912, tá møttust Danmark og Stóra Bretland aftur í finaluni. Aftur hesaferð lá Stóra Bretland omaná, talan gjørdist um ein 4-2 sigur á hesum sinni.

### Aldargamalt met fer at falla

Í tíðarskeiðnum millum 1910 og 1925 setti danski landsliðsspælarin, Poul »Tist« Nielsen eitt sjáldsamt met. Í bert 38 landsdystum – tað var ikki so títt millum landsdystirnar tá – skeyt Poul “Tist” Nielsen heili 52 mál. Bara í tí eina dystinum, tá Danmark vann 10-0 á Svøríki skeyt Poul »Tist« Nielsen seks mál.

Skjótt aldargamla metið stendur skjótt fyri falli. Jon Dahl Tomasson er í 102 landsdystum komin uppá 51 mál. Jon Dahl Tomasson var skaddur herfyri, so hann fekk ikki spælt við í HM-undankappingardystinum ímóti Malta í Parkini, men tað er ógvuliga sannlíkt, at Jon Dahl Tomasson tekur metið í 2009.

Ein annar kendur landsliðsspælari í Danmark hesa tíðina var Harald Bohr úr AB í Gladsaxe. Harald Bohr var bróðir tann kenda vísindamannin, Niels Bohr. Millum stuttligu søgurnar er, at Niels Bohr var í audiensi hjá Christian 10. kongi, og kongur helt, at hann tosaði við bóltsnillingin, Harald Bohr.

Tað var ímóti formligu etikettini at rætta uppá kong, men Niels Bohr kendi seg noyddan at siga við kong, at hann ikki var tann kendi danski landsliðsspælarin.

Annars vóru 1920-árini og 1930-árini ikki besta tíðarskeiðið hjá danska fótbóltslandsliðnum. Danmark reyk út í innleiðandi umfarinum í dysti ímóti Spania, tá olympisku leikirnir vóru í Antwerpen í 1920. Og satt at siga, so hevur Spania ofta plágað Danmark á fótbóltsvøllinum hesi 100 árini.

Hæddarpunktið hjá fótbóltsáhugaðum dønum í mong ár, var tann árligi landsdysturin ímóti arvafíggindanum, Svøríki, sum var uppá skift í londunum báðum.

### Hitler og bronsa

1940'ini standa sum størsta paradoksið í danskari landsliðssøgu. 9. apríl í 1940 hertók Nazi-Týskland Danmark, og gjørdust tey næstu fimm árini ein óttafull tíð hjá dønum, um enn Danmark slapp betur frá krígnum, enn flest onnur lond, ið gjørdust partur av 2. heimsbardaga.

Danskir søgufrøðingar hava mangan hølvað táverandi leiðsluna hjá DBU av fyri teirra margháttligu avgerðir.

Á undrunnarverdan og løgnan hátt valdi leiðslan í DBU at samstarva við fótbóltssambandið hjá Nazi-Týsklandi, og spældi Danmark tveir landsdystir í 1940 og í 1941 ímóti landinum, sum hertók teir, og sum fór so illa við fólkunum í nógvum øðrum evropeiskum londum. Hesir báðir landsdystirnir standa fyri mangar danskar fótbóltssøgufrøðingar og landsliðsstuðlar sum svartasti kapitulin í danskari landsliðssøgu.

Men stutt aftaná kríggið fekk danskur landsliðsfótbóltur sína endurreisn. Danmark vann bronsu, tá OL var í London í 1948. Serliga minnilig var fjórðingsfinalan ímóti Italia, sum Danmark vann 5-3. Talan var um eitt brak av einum dysti, sum útvarpslegendan, Gunnar »Nu« Hansen eisini gav til kennar fyri mongu lurtarnar heima í donsku stovunum. Danmark møti arvafíggindunum úr Svøríki í hálvfinaluni. Svøríki vann 4-2, og kom í finaluna, sum teir vunnu 3-1 á Jugoslavia. Danmark møtti Stóra Bretlandi í bronsudystinum, og vunnu danir bronsukrónurnar við einum 5-3 sigri. Summir av teimum bestu donsku spælarunum, John Hansen og Carl Aage Præst gjørdust árini aftaná 1948 millum bestu yrkisspælarar í Seriu A í Italia.

### Silvur og hálvfinala

Frá byrjan í 1908 og fram til 1971 hevði DBU ein ógvuliga løgnan politikk, tá tað kom til danska landsliðið. Eingin danskur spælari, sum livdi burtur av at spæla fótbólt slapp á danska landsliðið. Danska landsliðið skuldi bara verða mannað við amatørum. Avleiðingin av hesum var, at Danmark fekk nakrar ordans umgangir, tá teir møttu sterkum londum, sum Svøríki og Ungarn, og bleiv enntá talan um tap uppá 6-0 á heimavølli Ítróttarparkini.

Men danir hava hesi 100 árini altíð megnað at uppalt stór fótbóltstalent. Danmark kvalifiseraði seg til olympisku leikirnar, sum vóru í Róm í 1960. Danmark spældi seg tá til sína fjórðu OL-hálvfinalu í søguni. Danmark vann hesa minniligu hálvfinaluna ímóti Ungarn við 2-0. Málskjúttar vóru Henning Enoksen og Harald Nielsen, sum seinni